FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Søgu- og samfelagsdeildin

Tórshavn - Juli 2024

# VÆLKOMIN Á SØGU- OG SAMFELAGSDEILDINA (SSD) Á FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Góði nýggi lesandi,

Til lukku við upptøkuni á bachelor útbúgvingina í búskaparfrøði og virkisfrøði á Setrinum. Vit vænta og vóna, at tú fært trý góð, lærurík, kveikjandi og mennandi ár á Setrinum.

Lestrarárið byrjar mánadagin 19. august, kl. 9.00, í Kongshøll í Sjóvinnuhúsinum við felags innleiðslu fyri øll nýggj lesandi á Fróðskaparsetrinum. Klokkan 11.15 heldur innleiðslan fram á Søgu- og samfelagsdeildini. Vika 34 er innleiðsluvika, tvs. at vanliga undirvísingin byrjar í viku 35, mánadagin 26. august.

Tað er av stórum týdningi, at tú ert við til innleiðsluna, soleiðis at tú fært upplýsingarnar, sum tú hevur tørv á – um útbúgvingina og skeiðini, mannagongdir og reglugerðir, kunningar- og samskiftispallar, starvsfólk og lestrarvegleiðing, osf. Kunnað verður eisini um bøkur, sum tú skalt keypa, áðrenn undirvísingin byrjar. Harumframt er innleiðslan eitt gott høvi at heilsa uppá onnur lesandi og starvsfólk á deildini.

Fyrstu lestrarhálvuna hava tit hesi fýra skeið:

1. Aðaltættir í búskaparfrøði
2. Roknskaparfrøði og -greining
3. Marknaðarføring
4. Støddfrøði 1

Tá undirvísingin byrjar, kunnar undirvísarin tykkum um innihald í skeiðinum og krøv til tykkum í sambandi við skeiðið, m.a. læruúrtøkur, arbeiðsbyrðu og próvtøku.

Um tú hevur spurningar, ert tú vælkomin at seta teg í samband við skrivstovuna á Fróðskaparsetrinum á lss@setur.fo ella útbúgvingarleiðaran, Herit Albinus (teldupostur: herita@setur.fo ella tlf. 279330)

*Vit gleða okkum til at síggja teg.*

Vinaliga

Herit Albinus
Útbúgvingarleiðari, Búskaparfrøði og virkisfrøði

Erika Ann Hayfield
Dekanur

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Søgu- og samfelagsdeildin

# Skrá fyri innleiðsluna á Søgu- og samfelagsdeildini 2024

**Mánadagin 19. august í Kongshøll í Sjóvinnuhúsunum, Vestarabryggja 15**

Tiltakið byrjar kl. 09.15, men tit skulu helst møta eitt sindur fyrr at heinta tykkara lestrarkort uttan fyri Kongshøll.

| | |
|---|---|
| Kl. 09.00 | Skráseting |
| Kl. 09.15 | Rektarin bjóðar vælkomin |
| Kl. 09.25 | Lestrarskrivstovan bjóðar vælkomin |
| Kl. 09.30 | Tónleikur |
| Kl. 09.45 | Stutt røða |
| Kl 10.00 | Lesandi fáa høvi at vitja básar. (Studni, Betri Banki, Landsbókasavnið, Rit og Rák, Ráð Teirra Lesandi, MFS og onnur verða boðin við) |

*Lesandi fara út á deildirnar.*

| | |
|---|---|
| **Kl. 11.00** | **Lesandi fara til SSD í Jónas Broncksgøtu 25, mentorar verða til hjálpar at vísa veg** |
| Kl. 11.15 | Dekanurin bjóðar stutt vælkomin og felags myndatøka. |
| Kl. 12.00 | Lesandi fara hvør við sínum útbúgvingarleiðara inn í undirvísingarhølini og bjóða vit eina lætta máltíð. Her fáa lesandi høvi til at heilsa uppá hvønn annan, útbúgvingarleiðaran og onnur, ið hava eitt serligt tilknýti til útbúgvingina. Útbúgvingarleiðarin kunnar um útbúgvingina, umframt krøv og væntanir til tann lesandi. Hetta er eisini ein góð løta at tosa saman og spyrja um møgulig ivamál.<br><br>Eisini verður rundsýning í bygninginum og høvi at heilsa uppá starvsfólk. |

**Týsdagin 20. august**

Kunnandi tiltak við ymiskum viðkomandi fyrilestrum verður í Kongshøll í Sjóvinnuhúsinum (Vestarabryggja 15) millum kl. 9-11. Endalig skrá kemur seinni.

**Mikudagin 21. august**

Dagur saman við mentorum. Útferð til Nólsoyar. Møtast á Bursatanga kl. 9.15
Báturin siglir úr Havnini kl. 9.30, og vit sigla úr Nólsoy aftur kl. 13.00

Havið matpakka við.

**Fríggjadagin 23. august**

| | |
|---|---|
| Kl. 10.00 -12.00 | KT-vegleiðing í auluni á Námsvísindadeildini (Frælsið 20) – Skipað verður fyri víðkaðari KT-kunning fyrrapartin av degnum, har tey lesandi fáa høvi at sita við telduni og fáa beinleiðis vegleiðing at rita inn í ymisku skipanirnar, sum verða brúktar í útbúgvingini. |
| Kl. 17.00-20.00 | Felags døgurði í Jónas Broncksgøtu, har vit hugna okkum saman, áðrenn farið verður til SetursSamanShow. |
| Kl. 20.00 | SeturSamanShow í Reinsarínum |